KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 09.07.2015 kl. 17:30
Málnr.:
Nevndarlimir:

Onnur:
Protokollførari:

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
55/15	13/01072-8	Miðbýur, góðkenning av skipanaruppskoti, fígging v.m. – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
56/15	15/00213-8	Eykajáttan 2015, Staðbundnu nevndirnar + Marjunar Hav – *fyrra viðgerð*
57/15	15/00542-10	Eykajáttan til Fólkaskúlan 2015 – *fyrra viðgerð*
58/15	15/00545-1	Eykajáttan til Læknamiðstøðina 2015 – *fyrra viðgerð*
59/15	15/00570-1	Eykajáttan 2015, aðrar framflytingar frá 2014 til 2015 – *fyrra viðgerð*
60/15	15/00578-2	Asfaltsbingja til smærri umvælingar – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
61/15	09/00047-52	Eldraráð - felags fyri allar Norðoyggjar frá 1. januar 2017
62/15	14/00862-14	Kommunal yvirtøka av bókhaldinum og framtíðar skipan av stovninum - Sjálvsognarstovnurin Mylnuhúsið - *eykajáttan, seinna viðgerð*
63/15	14/00648-69	Bráfeingis ábøtur vegna staðfesting av fukt/soppi undir vindeygum á niðastu hædd í ovara skúla
64/15	15/00139-8	Raðfesting av íløguarbeiðum í 2015 - Klaksvíkar Havn
65/15	15/00281-2	Umsókn um broyting í Almennu Byggisamtyktini í Árnafirði
66/15	15/00216-2	Umsókn um samanlegging av matr. nr. 8 og 87 í Árnafirði
67/15	15/00567-5	Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 39 í Árnafirði
68/15	15/00526-2	Umsókn um marknaumskipan millum matr. nr. 940a og 715a við Borðoyarvík
EYKAMÁL	15/00429-3	Byggiloyvi til afturatbygging, matr nr. 1457, Ísak Johannesen, ark.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

55/15
13/01072 Miðbýur, góðkenning av skipanaruppskoti, fígging v.m. – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	29.06.2015	51/15	
2 Mentanarnevndin	30.06.2015	25/15	
3 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	01.07.2015	16/15	
4 Havna- og Vinnunevndin	30.06.2015	24/15	
5 Trivnaðarnevndin "Eldri & Bústaðir"	30.06.2015	8/15	
6 Tekniska Nevnd	01.07.2015	20/15	
7 Ferðslunevndin	30.06.2015	13/15	
8 Fíggjarnevndin	07.07.2015	46/15	
9 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð*	09.07.2015	55/15	
10 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	10.09.2012		

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá teknisku umsiting, dagf. 23. juni 2015, ið greiðir frá miðbýarætlanini.

Arbeitt verður við einari "designmanual" (sniðhandbók), sum skal nýtast í samskiftinum millum tey, sum byggja í miðbýarøkinum og kommununa. Væntandi verður sniðhandbókin løgd fyri viðkomandi nevndir og býráð í heyst.
Síðani skal arbeiðast við projektering av 1. byggistigi av miðbýarætlanini, sum er økið kring torgið, har Bústaðir o.a. fara undir íbúðarbygging og mistaðarbygging. Atkomuvegurin frá Biskupsstøðgøtu til torgið hoyrir við til hetta projektið.

Talan er um eitt byggibúningarprojekt, har ætlan eisini verður gjørd fyri ravmagns-, telefon-, drekkivatn-, sjóhita og kloakkútbúnað o.a. Greiða skal eisini fáast á, hvussu stórt økið skal verða, sum skal byggibúgvast, rekreativ økir, parkering, møguliga ruskskipan o.a.

Projekteringsarbeiðið verður skipað í tveimum, eitt skipanaruppskot fyri alt miðbýarøkið, og eftir hetta endalig projektering av byggibúningini, sum krevst, fyri at tann fyrsti parturin av miðbýarætlanini kann takast alment í nýtslu.

Um skipanaruppskotið verður samtykt av nevndum og býráði, so viðførir málið eina neyðuga regulering av teimum ómatrikkuleraðu byggifeltunum í serstøku byggisamtyktini fyri miðbýin, og verður tann viðgerðin tikin upp í september umfarinum.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking.

Fíggjarligar avleiðingar:
Málið viðførir, at fíggjarætlanin fyri 2015 hækkar við nevndu eykajáttan áljóðandi kr. 6.000.000,-, sum verður tikin av tøkum peningi. Sambært hesum skal málið samtykkjast tvær ferðir av Býráðnum, og tá kommunan er væl undir einari álíkning, skal Fíggjarmálaráðið bert kunnast.

Tilmæli:
Við hesum verður mælt nevndum og býráði til at samtykkja skipanaruppskotið og at taka undir við nevndu broyting av fíggjarætlanini fyri 2015.

Nevndarsamtyktir:
UBN 29-06-2015: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku Umsiting dagf. 23.06.2015.

MeN 30-06-2015: *Arkitekturin kunnaði nevndina um skipanaruppskotið á fundinum.* Nevndin tekur undir við UBN 29.06.2015.

FeN 30-06-2015: Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU dagfest 23-06-2015, tó verður lagt upp til, at undirføringar til fótgangara og súkklandi verða framdar undir Biskopstøðsgøtu og eisini Gerðagøtu, ið binda økini saman.

HaVN 30-06-2015: Arkitekturin kunnaði um ætlanina. Nevndin tekur undir við UBN 29-06-2015, MeN 30-6-2015 og FeN 30-06-2015.

TrN E&B 30-06-2015: Nevndin tekur undir við UBN 29-06-2015, MeN 30-6-2015, FeN 30-06-2015 og HaVN 30-06-2015.

TrN B&U 01-07-2015: Nevndin tekur undir við við UBN 29-06-2015, MeN 30-6-2015, FeN 30-06-2015, HaVN 30-06-2015 og TrN E&B 30-06-2015.

TN 01-07-2015: Nevndin tekur undir við UBN 29-06-2015, MeN 30-6-2015, FeN 30-06-2015, HaVN 30-06-2015 og TrN B&U 01-07-2015.

FíN 07-07-2015: Nevndin tekur undir við UBN 29-06-2015, MeN 30-6-2015, FeN 30-06-2015, HaVN 30-06-2015, TrN B&U 01-07-2015 og TN 01-07-2015.

Býráðsins samtykt 09-07-2015:
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 07-07-2015.

56/15
15/00213 Eykajáttan 2015, Staðbundnu nevndirnar (+ 15/00532 Marjunar Hav) – *fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	29.06.2015	53/15	
2 Mentanarnevndin	30.06.2015	26/15	
3 Tekniska Nevnd	01.07.2015	27/15	
4 Fíggjarnevndin	07.07.2015	49/15	
5 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðg.* - saman við 15/00532	09.07.2015	56/15	
6 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðg.* - saman við 15/00532	10.09.2015		

Frágreiðing um málið (15/00213):
Vístverður til skriv frá teknisku umsiting viðv. verkætlanum hjá staðbundnu nevndunum, dagf. 9. juni 2015, og skriv frá mentanardeildini viðv. verkætlanini Marjunar Hav, dagf. 10. juni 2015.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Staðbundnu nevndirnar hava í mars 2015 samtykt at heita á allar avvarðandi nevndir hjá Býráðnum um at raðfesta nøkur av málunum, ið staðbundnu nevndirnar hava mælt til í 2015. Í hesum sambandi varð víst á raðfestingina hjá staðbundnu nevndunum við vegleiðandi kostnaði, har hetta var gjørligt.

Á fundi í staðbundnu nevndunum í juni 2015 hevur málið fingið umrøðu, og borgarstjórin hevur heitt á umsitingina um at leggja eitt uppskot um eykajáttan fyri nevndir og býráð í juni 2015. Talan er um niðanfyri nevndu verkætlanir:

Verkætlan:	Nevnd:	Kontonavn:	Eykajáttan, tkr:
Húsið við sparkivøllin í Mikladali	MeN	Fastognir (Í)	300
Marjunar Hav	MeN	Ym. Tilb./tiltøk - Men/frítíð (Í)	200
Inniloking av Gamlagarði v.m.*	UBN	Fastognir (Í)	300
Gøtuljósini í Árnafirði til LED-ljós	TN	Gøtuljós (Í)	300
Í Eykajáttan í alt			1.100

*(*talan er um arbeiði, sum var raðfest í 2014, men sum ikki bleiv gjørt liðugt)*

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin § 41, stk. 2 sigur, at «kommunustýrið kann veita eykajáttan um neyðugt. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað»

Fíggjarligar avleiðingar:
Talan er um eina samlaða eykajáttan upp á 1.100 tkr., sum ætlast fíggjað av tøkum peningi. Hetta merkir, at íløgusíðan á Fíggjarætlanini fyri 2015 hækkar við 1.100 tkr. Málið skal samtykkjast av býráðnum tvær ferðir, og Fíggjarmálaráðið skal kunnast.

Tilmæli:
Hervið verður málið um eykajáttanir í samband við íløguarbeiðir í Mikladali, Svínoy og Árnafirði lagt fyri nevndir og býráð til støðutakan/góðkenningar.

Tilmæli – Marjunar Hav:

1. at settar verða av kr. 200.000,-
2. at peningurin verður settur av sum íløga – *nýggj verkætlan, Marjunar Hav*
3. at peningurin verður játtaður nú av tøkum peningi – *eykajáttan*

at um neyðugt verður við meira peningi vegna annað, sum knýtist at lýstu verkætlanini ella av møguligum óvæntaðum, so verður stigtakarin at søkja aðrar stovnar og virki um stuðul til tað - sum hann eisini er sinnaður til.

Nevndarsamtyktir:
UBN 29-06-2015: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku Umsiting dagf. 09.06.2015

MeN 30-06-2015: Nevndin tekur undir við UBN: 29.06.2015.

TN 01-07-2015: Nevndin tekur undir við UBN 29-06-2015 og MeN 30-06-2015, og mælir til nevndu broyting av fíggjarætlanini.

FiN 07-07-2015: Nevndin tekur undir við UBN 29-06-2015, MeN 30-06-2015 og TN 01-07-2015.

Nevndarsamtyktir viðv. verkætlanini Marjunar Hav:

MiklaN 01-06-2015: Nevndin tekur undir við verkætlanini.

UBN 29-06-2015: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Mentanarleiðaranum dagf. 10.06.2015.

MeN 30-06-2015: Nevndin tekur undir við UBN 29-06-2015.

FiN 07-07-2015: Nevndin tekur undir við UBN 29-06-2015 og MeN 30-06-2015.

Býráðsins samtykt 09-07-2015:
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 07-07-2015.

57/15
15/00542 Eykajáttan til Fólkaskúlan 2015 – *fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Mentanarnevndin	30.06.2015	27/15	
2 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	01.07.2015	19/15	
3 Fíggjarnevndin	07.07.2015	50/15	
4 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð*	09.07.2015	57/15	
5 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	10.09.2015		

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá trivnaðardeildini, dagf. 10. juni 2015.

Leiguviðurskifti:
Í samband við skúlabyggingina er neyðugt hjá skúlanum at húsast á ymiskum støðum, meðan bygt verður. Í hesum sambandi hevur skúlin tørv á eykajáttan til húsaleigu.

Nýggj avseting til Sprotan:
Í sambandi við at kommunurnar – í samstarvi við Mentamálaráðið – gjørdi avtalu við Sprotan um eitt fast gjald, manglar ein avseting á kr. 45.000,-
Gjaldið til Sprotan er kr. 60.000,- harav vit hava funnið eina fígging innan verandi fíggjarkarm á kr. 15.000,- soleiðis at tørvur er á kr. 45.000,- netto til at dekka hesa nýggju útreiðslu.

Lógargrundarlag:
Fólkaskúlalógin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Á fíggjarætlanini fyri 2015 eru avsettar kr. 306.430 til húsaleigu, meðan húsaleigurnar á skúlaøkinum eru hesar:

	Árið 2015:	***Árið 2016:***
Tekniski Skúli, við Garðavegin:	kr. 212.400,-	kr. 212.400,-
Køkurin hjá Tekniska Skúla:	kr. 76.800,-	kr. 76.800,-
Heygabúðin, 2 skúlastovur:	kr. 84.000,-	kr. 42.000,- (endar í juni 2016)
KÍ-høllin, 3 skúlastovur:	kr. 50.000,- (byrjar í august 2015)	kr. 120.000,-
Leiguútreiðslur samanlagt:	**kr. 423.200,-**	**kr. 451.200,-**

Verandi avseting í fíggjarætlanini: kr. 306.430,-
Tvs. neyðug eykajáttan 2015: kr. 116.770,-

Tilmæli:
Sostatt er neyðugt við einari eykajáttan til húsaleigu í inniverandi fíggjarætlan (2015), á kr. 66.770,- sum verður sett av innan kontubólkin/rakstrarstaðið "Fólkaskúlin, aðrar útreiðslur".

Harumframt er tørvur á einari eykajáttan á kr. 45.000,- til Sprotan, sum verður sett av innan kontubólkin /rakstrarstaðið "Skúlin felags – Ymiskt".

Nevndarsamtyktir:
MeN 30-06-2015: Nevndin tekur undir við at leiga norðara part av KÍ-høllini til brúks hjá Skúlanum – undirvísing, og at leigan verður kr. 10.000,- / mðr. Hesa leiguinntøka verður ítróttarøkið at ráða yvir.

TrN B&U 01-07-2015: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini dagf. 10-06-2015 og MeN 30-06-2015.

FíN 07-07-2015: Nevndin tekur undir við MeN 30-06-2015 og TrN B&U 01-07-2015 og mælir til, at serstøk eykajáttan fyri 2015 á kr. 400.000 verður til fígging av omanfyrinevndu útreiðslum og bókakeypi.

Býráðsins samtykt 09-07-2015:
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 07-07-2015.

58/15
15/00545 Eykajáttan til Læknamiðstøðina 2015 – *fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin "Eldri & Bústaðir"	30.06.2015	10/15	
2 Fíggjarnevndin	07.07.2015	51/15	
3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð*	09.07.2015	58/15	
4 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	10.09.2015		

Frágreiðing um málið:
Vístverður til skriv frá trivnaðardeildini, dagf. 9. juni 2015.

Á fundi hjá TrN E&B tann 19. februar 2015 varð støðulýsing av Læknamiðstøðini løgd fyri nevndina sum kunningarmál. Kunningin snúði seg um, at allar tríggjar viðtalurnar vóru mannaðar við avloysarum, og at hetta fór at geva kommununi eyka útreiðslur til búðstaðarleigu og ymiskt tilfar í viðtaluni. Tá ið talan er um avloysarar, hevur kommunan sambært løgtingslóg skyldu at útvega frían bústað og at rinda fyri ymiskt tilfar, sum avloysarin brúkar í sínari viðtalu, og tað ger Klaksvíkar kommuna sjálvsagt eisini.

Harumframt hevur TrN E&B samtykt at gera hóskandi atkomu til Læknamiðstøðina. Somuleiðis hevur TrN E&B samtykt at stovnseta Læknaviðtaluportal/heimasíðu at betra um samskiftið millum borgaran og Læknamiðstøðina.

Lógargrundarlag:

*Løgtingslóg nr. 28 frá 23. apríl 1999 um kommunulæknaskipan, sum broytt við løgtingslóg nr 23. frá 16. mars 2007, og kunngerð nr. 64 frá 29. september 2004 um støðið, viðlíkahald, rakstur v.m. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum.

*Kunngerð nr. 13 frá 10. februar 2012 um atkomuviðurskifti – endamálið í kunngerðini er soljóðandi:
§ 1. Bygningar skulu byggjast og innrættast á slíkan hátt, at tað í nøktandi mun, í sambandi við nýtsluna av bygninginum, verða tikin atlit at trygd, heilsu og atkomuviðurskiftum. Stk. 2. Atkoma uttandura og atkoma til og frá bygningum skal gerast soleiðis, at øll kunnu nýta bygningin ótarnað.

Fíggjarligar avleiðingar:

		Vantar í
Framroknað hall í 2015	kr. - 133.000,-	
Flyting frá Serflutningsskipanini	kr. 50.000,-	
Munur – **eykajáttan . . . . . .**	**kr. - 83.000,-**	**kr. - 83.000,-**
Automatisk úthurð	kr. - 30.000,-	
Flyting frá "Stuðul Almanna- og Heilsumál" . . .	kr. 30.000,-	
Munur	kr. 0,-	**kr. 0,-**
Viðtaluportalur/ Heimasíða	kr. - 50.000,-	**kr. - 50.000,-**
Samlaður tørvur á eykajáttan til Læknamiðstøðina 2015 . . .		**kr. -133.000,-**

Tilmæli:
Vísandi til øktar útreiðslur á Læknamiðstøðini í inniverandi rakstarári og til stovnsetan av viðtaluportali, verður tørvurin á eykajáttan á kr. 133.000,- við hesum lagdur fyri politiska myndugleikan til støðutakan.

Nevndarsamtyktir:
TrN E&B 30-06-2015: Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 09-06-2015, har biðið verður um 100.000 kr í eykajáttan. Viðtaluportalurin verður at fremja og fíggja í samráð við grannakommunurnar. Viðtaluportalurin verður klárur at taka í nýtslu í januar 2016.

FíN 07-07-2015: Nevndin tekur undir við TrN E&B 30-06-2015

Býráðsins samtykt 09-07-2015:
Eimælt samtykt at taka undir við FíN 07-07-2015.

59/15
15/00570 Eykajáttan 2015 - aðrar framflytingar frá 2014 til 2015 – *fyrrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	29.06.2015	52/15	
2 Tekniska Nevnd	01.07.2015	26/15	
3 Fíggjarnevndin	07.07.2015	48/15	
4 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð*	09.07.2015	59/15	

5 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	10.09.2015		

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 8. juni 2015, har m.a. verður greitt frá óbrúktum játtanum í 2014 og ynskjum um framflytingar til 2015.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin § 41, stk. 2 sigur, at «kommunustýrið kann tó um neyðugt veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað».

Fíggjarligar avleiðingar:
Framflytingar eru at meta sum eykajáttanir. Hetta merkir, at íløgurnar hækka ávikavist 2.350 tkr. Kommunan hevur gott gjaldføri í løtuni og við at fíggja arbeiðini við tøkum peningi, lækkar gjaldførið samsvarandi.

Tilmæli:
Hervið verður málið um eykajáttanirnar ísbv. framflytingar lagdar fyri nevnd og býráð til støðutakan/ góðkenningar.

Nevndarsamtyktir:
UBN 29-06-2015: Tikið verður undir við tilmælinum 08.06.2015

TN 01-07-2015: Nevndin tekur undir við UBN 29-06-2015, og mælir til nevndu broyting av fíggjarætlanini.

FíN 07-07-2015: Nevndin tekur undir við UBN 29-06-2015 og TN 01-07-2015.

Býráðsins samtykt 09-07-2015:
Eimælt samtykt at taka undir við FíN 07-07-2015.

60/15
15/00578 Asfaltsbingja til smærri umvælingar – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Tekniska Nevnd	01.07.2015	23/15	
2 Fíggjarnevndin	07.07.2015	58/15	
3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð*	09.07.2015	60/15	
4 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	10.09.2015		

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá teknisku umsiting, dagf. 9. juni 2015.

Ein asfaltsbingja til smærri asfaltsumvælingar av vegum kommunurnar hevði komið sera væl við hjá kommununi, tí vegirnir eru illa slitnir og hava fingið stóran frostskaða eftir tann seinasta veturin.

Viðlíkahaldið av vegum er tíðarkrevjandi og kostnaðarmikið, og við verandi arbeiðsgongd halda umvælingarnar ofta stytri enn eina viku.

Mett verður, at bøting av holum í vegnum við heitum asfalti við límí er ein loysn, sum heldur munandi betur, og úrslitið verður frægari vegir í kommununi,fyri minni rakstrarkostnað pr. ár enn tað, sum er galdandi í dag.

Um kommunan skal útvega sær eina asfaltbingju fyri uml. 200 tkr., hava vit bert asfaltskontoina at vísa á, og krevur málið broyting av fíggjarætlanini fyri 2015.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking.

Fíggjarligar avleiðingar:
Um málið verður samtykt viðførir hetta eina broyting av fíggjarætlan kommununnar. Rakstrarkontan Vegir (Asfalteringsviðlíkahald) minkar við 200 tkr., og Íløgukontan Maskinur veksur við somu upphædd – 200 tkr. Málið krevur 2 býráðsviðgerðir, og Fíggjarmálaráðið skal kunnast um broytingina.

Tilmæli:
Hervið verður málið um møguligt keyp at einari asfaltbingju til smærri umvælingar lagt fyri nevndir og býráð til støðutakan/góðkenningar.

Nevndarsamtyktir:
TN 01-07-2015: Nevndin tekur undir við málinum og mælir í hesum sambandi til neyðuga broyting av fíggjarætlanini.

FíN 07-07-2015: Nevndin tekur undir við TN 01-07-2015.

Býráðsins samtykt 09-07-2015:
Eimælt samtykt at taka undir við FíN 07-07-2015.

61/15
09/00047 Eldraráð - felags fyri allar Norðoyggjar frá 1. januar 2017

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin "Eldri & Bústaðir"	30.06.2015	9/15	
2 Klaksvíkar Býráð	09.07.2015	61/15	

Frágreiðing um málið:
Í sambandi við at eldraøkið er lagt til kommunurnar at umsita og ábyrgdast fyri, er tað ásett í eldralóggávuni, at kommunurnar í einum samstarvsøki – tvs. eitt nú í Norðoyggjum – kunnu skipa fyri vali av felags eldraráði fyri Norðoyggjar.

Í løtuni er tað bert her í Klaksvíkar kommunu, at eitt eldraráð er valt og skipað. Tískil er ikki samsvar millum brúkarsíðuna, har bert Klaksvíkar kommuna er umboðað, meðan allar kommununar í Norðoyggjar samstarva á myndugleikasíðuni, har tær verða umboðaðar av Norðoya Bú- og Heimatænastu (NBH).

Fyri at fáa javnvág millum hesar partar samsvarandi eldralóggávuni, mælir umsitingin til, at Klaksvíkar kommuna yvir fyri hinum kommununum í Norðoyggjum skjýtur upp, at eitt felags eldraráð fyri allar kommunurnar í Norðoyggjum verður valt, og at hetta í sínum virki fer at samskifta við NBH.

Lógargrundarlag:
Viðfest hesum tilmæli er notat frá løgfrøðingi kommununnar, har hann lýsir samanhangin og lógarheimild v.m., og har hansara tilmæli er soljóðandi:

NBH er rætti myndugleikin at stovnseta eitt eldraráð fyri alt øki, og sum fevnir um allar kommunurnar í Norðoyggjum. Tað er bara eitt eldraráð í norðurøkinum. Víst verður til samstarvsavtaluna.

Av praktiskum orsøkum verður mælt til, at eldraráðið fyri Norðoyggjar, verður valt á fyrsta sinni við komandi kommunuval. Mælt verður til, at leiðarin fyri NBH umboðar áhugamálini hjá teimum kommunum, sum í dag ikki hava eldraráð, hetta fram til komandi kommunuval.

Fíggjarligar avleiðingar:
Í verandi støðu rindar kommunan longu fyri eitt eldraráð, har árliga avsetingin er kr. 15.000,- og tí kann neyvan roknast við meirkostnaði av einum felags eldraráð fyri Norðoyggjar.

Tilmæli:
Mælt verður til, at Klaksvíkar kommuna yvir fyri hinum kommununum skjýtur upp at seta á stovn eitt felags eldraráð fyri allar Norðoyggjar, galdandi frá komandi kommunuvalskeiði, og at hetta í sínum virki fer at samskifta við NBH, sum kommunurnar hava litið upp í hendur at umsita eldraøkið sína vegna.

Nevndarsamtyktir:
TrN E&B 30-06-2015: Nevndin tekur undir við tilmæli frá umsitingini dagf 11-06-2015.

Býráðsins samtykt 09-07-2015:
Eimælt samtykt at taka undir við TrN E&B 30-06-2015.

62/15
14/00862 Kommunal yvirtøka av bókhaldinum og framtíðar skipan av stovninum - Sjálvsognarstovnurin Mylnuhúsið - *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	21.04.2015	9/15	
2 Fíggjarnevndin	28.04.2015	28/15	
3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð*	30.04.2015	31/15	
4 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	09.07.2015	62/15	

Frágreiðing um málið:

Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 30. apríl 2015.

Ein partur av hesum máli snýr seg um, at stýrið fyri nú skjótt fyrrverandi Sjálvsognarstovnin Mylnuhúsið setti tað sum fortreyt fyri avtøkuni, at Mylnuhúsið kann brúka sín innistandandi pening, sum upprunaliga er ætlaður og spardur upp til átrokandi ábøtur á bygning og uttanumøki.

Hóast sjálvsognarstovnurin hevur uppspart sær peningin á bók – so er hetta bókhaldstekniskt at meta sum ein eykajáttan, og hetta er orsøkin til, at málið krevur tvær býráðssamtyktir.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin ásetur, at ikki kann farast undir nakað útreiðslukrevjandi tiltak, uttan at játtan frá býráðnum fyriliggur frammanundan.

Fíggjarligar avleiðingar:
Umrøddi peningur er, sum nevnt, uppspardur á kontu hjá Sjálvsognarstovninum Mylnuhúsið, sum nú við seinnu samtykt býráðsins formliga verður avtikin. Tí verður hesin uppspardi peningurin á henda hátt – saman við øllum ognum og skyldum sjálvsognarstovnsins – fyrst yvirtikin av kommununi, sum síðani játtar hann aftur til Mylnuhúsið sum ein eyka íløgujáttan, til áleikandi ábøtur á bygning og/ella uttanumøki.

Tilmæli:
Málið verður við hesum lagt fyri býráðið til seinnu samtykt.

Nevndarsamtyktir:
TrN B&U 21-04-2015: Nevndin tekur undir við tilmælinum dagfest 15-04-2015.

FíN 28-04-2015: Nevndin tekur undir við TrN B&U 21-04-2015.

BýR 30-04-2015: Einmælt samtykt at taka undir við FíN 28-04-2015.

Býráðsins samtykt 09-07-2015
Eimælt samtykt við seinnu viðgerð.

63/15
14/00648 Bráfeingis ábøtur vegna staðfesting av fukt/soppi undir vindeygum á niðastu hædd í ovara skúla

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	01.07.2015	30/15	
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	29.06.2015	74/15	
3 Fíggjarnevndin	07.07.2015	53/15	
4 Klaksvíkar Býráð	09.07.2015	63/15	

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 23. juni 2015.

Sum kunnugt varð skúlin raktur av soppi í fjør summar, sum varð fyribeindur við fleiri ymiskum tiltøkum, ið vístu seg at vera nøktandi til at loysa málið. Tó vísir tað seg nú, at tað á einum øki framvegis eru trupulleikar, sum krevja eitt eyka átak nú í summarfrítíðini.

Umsitingin hevur síðani verið í sambandi við Teknisku umsiting, har vit hava kunnað byggifulltrúan og – umvegis tekniska stjóran – hava heitt á byggifrøðing, sum varðar av bygningum kommununnar, um at koma við einari ætlan fyri og kostnaðarmeting av tí, sum her krevur at verða gjørt til tess at basa soppinum í veggunum undir nevndu vindeygum.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011, ásetur m.a. hetta:

§ 47. Kommunustýrið hevur skyldu at skipa so fyri, at íbúgvarnir í kommununi hava møguleika at fáa ta í § 26 nevndu undirvísing í fólkaskúlanum, og at fígging er tøk til hetta.

Stk. 3. Tað er kommunustýrisins ábyrgd, at hóskandi undirvísingarhøli eru tøk til ta í § 26 nevndu undirvísing ...

Fíggjarligar avleiðingar:
Tekniska umsiting samskiftir í løtuni við Innilufttænastuna um, hvussu hetta málið best verður loyst tekniskt, og hvør kostnaðurin av hesum verður.

Tilmæli:
Mælt verður nevndum og býráð til at seta í verk ta umvælingarætlan, sum Innilufttænastan og Tekniska umsiting býráðsins mæla til, og at hetta – eins og gjørt varð í fjør summar – verður fíggjað av játtanini til bygging av nýggjum skúla.

Nevndarsamtyktir:
UBN 29-06-2015: Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 23.06.2015 treytað av, at Trivnaðarnevndin Børn og Ung samtykkir fíggingina.

TrN B&U 01-07-2015: Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 23-06-2015 og UBN 29-06-2015.

FíN 07-07-2015: Nevndin tekur undir við UBN 29-06-2015 og TrN B&U 01-07-2015.

Býráðsins samtykt 09-07-2015:
Eimælt samtykt at taka undir við FíN 07-07-2015.

64/15
15/00139 Raðfesting av íløguarbeiðum í 2015 - Klaksvíkar Havn

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Havna- og Vinnunevndin	30.06.2015	28/15	
2 Klaksvíkar Býráð	09.07.2015	64/15	

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá vinnu- og mentanardeildini, dagf. 23. juni 2015.

Í februar 2013 samtykti býráðið, at Grótbrotið kundi byrja gróttøku á Borðoyarvík. Byrjað varð í økinum, men higartil er bert tað eina skotið framt. Í fleiri umførum hevur verið eftirlýst ein ætlan fyri framhaldandi virksemi, herundir rudding av økinum, sum við tíðini er blivið fylt upp við tilfari frá ymiskum útgrevstrum í býnum. Av hesum er stórsti parturin avlopsgrót frá kirkjugarðinum.

Umsitingin hevur kannað møguleikarnar fyri at gera eina útfylling norðanfyri økið, har Bakkafrost hevur hús (sí mynd). Hetta arbeiði kann fremjast við at nýta tilfarið, sum liggur á økinum. Við hesum fæst eitt meirøki upp á uml. 150 kvm. Ynski er eisini um at leingja bryggjukantin sunnanfyri við uml. 14 m.

Arbeiðið er ikki meira umfatandi, enn at fólk og maskinur frá Grótbrotinum kunnu fremja hetta. Tekniska umsiting hevur mett arbeiðið til uml. kr. 250.000,-.

Fíggjarligar avleiðingar:
Málið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar, tí lagt verður upp til eina umraðfesting av íløgujáttanini hjá Klaksvíkar Havn.

Raðfestingin er hendan:

1.	Nýggj Havnaskrivastova	kr. 2.000.000,-
2.	Bátabrúgvar og sølutorg	kr. 1.000.000,-
3.	Norðhavnin – atløguviðurskifti	kr. 350.000,-

Tilmæli:
Við hesum verður mælt nevndini til, at arbeiðið verður framt, og at peningurin verður tikin av játtanini til nýggja havnaskrivstovu. Sambært hesum verður nýggja raðfestingin hjá Klaksvíar Havn hendan:

1.	Nýggj Havnaskrivastova	kr. 1.750.000,-
2.	Bátabrúgvar og sølutorg	kr. 1.000.000,-

3. Norðhavnin – atløguviðurskifti kr. 350.000,-
4. Útfylling norðanfyri øki hjá Bakkafrost í bátahylinum á Borðoyarvík kr. 250.000,-

Nevndarsamtyktir:
HaVN 30-06-2015: Ein minniluti, Óluva Klettskarð og Steinbjørn O. Jacobsen, tekur undir við tilmæli frá Havna- og Vinnustjóranum dagf. 23-06-2015. Ein annar minniluti, Herfrí J. Sørensen og Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, tekur støðu í býráðnum.

Býráðsins samtykt 09-07-2015:
Einmælt samtykt at taka undir minnilutanum í HaVN 30-06-2015 (ÓK og SOJ) og við tilmælinum frá vinnu- og mentanarstjóranum, dagf. 23-06-2015.

65/15
15/00281 Umsókn um broyting í Almennu Byggisamtyktini í Árnafirði

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Árnafjarðarnevndin	02.06.2015	3/15	
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	29.06.2015	63/15	
3 Klaksvíkar Býráð	09.07.2015	65/15	

Frágreiðing um málið:
(Víst verður eisini til mál 15/00216) Sí umsókn dagf. 17. mars 2015 frá eigaranum av matr. nr. 87 og 8 í Árnafirði, har søkt verður um broyting í byggisamtyktini, soleiðis at møguleiki verður fyri samanlegging av matr. nr. 87 og 8.

Galdandi byggisamtykt



Byggisamtykt, um tikið verður undir broyting

Lógargrundarlag:
Býarskipanarlógin

Tilmæli:
Treytað av, at lógarásettu reglurnar um almenna hoyring og kærufreist verða hildnar, hevur umsitingin ongar viðmerkingar til, at uppskot um regulering av økislinju millum A23 og D27 í Árnafirði verður samtykt, sum víst omanfyri.

Nevndarsamtyktir:

ÁrN 02-06-2015: Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Atli S. Justinussen, Jóna S. Joensen og Theodor Askham Olsen, tekur undir við málinum. Ein minniluti, Niclas Fredrik Justinussen, tekur ikki undir við málinum.

UBN 29-06-2015: Tikið verður undir við tilmælinum dagf. 28.05.2015.

Býráðsins samtykt 09-07-2015:
Eimælt samtykt at taka undir við UBN 29-06-2015.

66/15
15/00216 Umsókn um samanlegging av matr. nr. 8 og 87 í Árnafirði

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.03.2015	25/15	
2 Árnafjarðarnevndin	02.06.2015	2/15	
3 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	29.06.2015	64/15	
4 Klaksvíkar Býráð	09.07.2015	66/15	

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá teknisku umsiting, dagf. 10. mars 2015.

Umhvørvisstovan biður um býráðsins ummæli til samanlegging av matr. nr. 8 og 87 í Árnafirði, og verður samstundis gjørt vart við, at talan er um ognir liggjandi í hvør sínum økisparti í byggisamtyktini. Matr. nr. 8 liggur í økisparti A23 (blandað íbúðar- og vinnuendamál), meðan matr. nr. 87 liggur í D27 (grønt øki).

Frá Umhvørvisstovuni verður sagt, at teir ikki beinleiðis kunnu vísa á nakra paragraff í matrikullógini um samanlegging í mun til økismark, men at US hevur valt at viðgera samanlegging eftir sama leisti sum sundurbýti, har tað í § 17 stk 2 stendur soleiðis:

§ 17. [1)] Við sundurbýti má lutur ikki verða lagdur í sovorðnum skapi, at hann er óhentur til endamálið. Harundir má partur í felagseigindómi uttangarðs altíð hoyra til ávísan fastan eigindóm í somu markatalsbygd.
Stk. 2. [1)] Verður tað í kommunustýrisins ummæli eftir § 20 ella á annan hátt upplýst, at tað við sundurbýtinum koma fram viðurskifti, sum ikki samsvara reglunum í:
a) lóggávuni um byggi- og brunaviðurskifti,
b) eini góðkendari byggisamtykt ella býarskipan, ella
c) lóggávuni annars, kann sundurbýtið ikki verða góðkent uttan so, at avvarðandi myndugleiki hevur givið undantaksloyvi.

Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan ikki partur

Tilmæli:

Við tað at gagnnýtslan av matr. nr. 87 – sambært umsøkjaranum – er tengd av sethúsinum á matr. nr. 8, men galdandi økisáseting forðar fyri, at hetta kann samanbyggjast, mælir Tekniska Umsiting frá at viðmæla undantaksloyvi. Umsøkjarin hevur sjálvandi møguleika at søkja um broyting í byggisamtyktini við tí fyri eyga at skipa matriklarnir undir somu økisáseting. – Velur hann at royna tann møguleikan, verður málið til ta tíð at viðgera sum broyting í byggisamtykt.

Nevndarsamtyktir:
ÁrN 02-06-2015: Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Atli S. Justinussen, Jóna S. Joensen og Theodor Askham Olsen, mælir mælir til at byggisamtyktin verður broytt. Ein minniluti, Niclas Fredrik Justinussen, tekur ikki undir við málinum.

UBN 29-06-2015: Tikið verður undir við samanlegging, tá byggisamtyktarliga viðurskiftini er fingin uppá pláss - sí mál 15/00281.

Býráðsins samtykt 09-07-2015:
Eimælt samtykt at taka undir við UBN 29-06-2015.

67/15
15/00567 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 39 í Árnafirði

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	29.06.2015	65/15	
2 Klaksvíkar Býráð	09.07.2015	67/15	
3 Árnafjarðarnevndin	16.09.2015		

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá teknisku umsiting, dagf. 5. juni 2015.

Lógargrundarlag:
Matrikuleringslógin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

Tilmæli:
Eftirsum talan er um formalisering av higartil galdandi býtisavtalu millum nógvu eigararnar av gerðinum, hevur Tekniska Umsiting ongar viðmerkingar til, at sundurbýtið verður játtað.
Gjørt verður tó vart við, at um ella tá talan seinni verður um sundurbýti av pørtunum í ovaru rød frá vegnum, verða eigararnir framvið vegnum at góðtaka at lata lendi til atkomuveg eftir nærri útgreinaðari ætlan, sum tey til ta tíð verða at lata kommununi til góðkenningar.

Nevndarsamtyktir:
UBN 29-06-2015: Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 05.06.2015

Býráðsins samtykt 09-07-2015:
Eimælt samtykt at taka undir við UBN 29-06-2015.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

68/15
15/00526 Umsókn um marknaumskipan millum matr. nr. 940a og 715a við Borðoyarvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	29.06.2015	58/15	
2 Klaksvíkar Býráð	09.07.2015	68/15	

Frágreiðing um málið:
Víst verður til umsókn frá eigarunum móttikin 27. mai 2015, har biðið verður um at flyta 26 m^2 frá matr. nr. 715a til 940a

Lógargrundarlag:
-

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommuna ikki partur í málinum

Tilmæli:
Mælt verður til at senda Umhvørvisstovuni málið við tilmæli um at góðkenna umsóknina.

Nevndarsamtyktir:
UBN 29-06-2015: Tikið verður undir við tilmælinum frá Tekn. Ums. dagf. 29.05.2015.

Býráðsins samtykt 09-07-2015:
Eimælt samtykt at taka undir við UBN 29-06-2015.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

EYKAMÁL

15/00429 Byggiloyvi til afturatbygging, matr. nr. 1457 - Ísak Johannesen, ark.

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	29.06.2015	68/15	
2 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	01.07.2015	17/15	
3 Klaksvíkar Býráð	09.07.2015	EYKAMÁL	

Frágreiðing um málið:
Ísak Johannesen arkitektur søkir vegna Gunnvu Dragaberg og Jóan Petur Højsted, á Eiðinum 2, Klaksvík, um byggiloyi til afturatbygging sunnanfyri sethúsini á matr. nr. 1457.

Lógargrundarlag:
Matrikulin liggur í C7, sum er útlagt til Almenn endamál, hvar í almennir bygningar v.m. til undirvísingarendmál kunnu byggjast.
Í minsta lagi 1 bilstøðil pr. 40 m2 ábygd grundvídd, annars sambært meting frá byggivaldinum alt eftir hvat slag av virksemi talan er um

Fíggjarligar avleiðingar:

Tilmæli:
Framtíðar útbyggingin av fólkaskúlanum er samtykt, og eru mær kunnugt ongar ætlanir at fara inn á økið millum Heygaveg og á Eiðinum. Harafturat eru hús seld nýliga í økinum, uttan at kommunan hevur víst áhuga. Út frá hesum vil tekniska umsiting mæla til, at økið millum Heygaveg og á Eiðinum (C7) verður broytt til A10, eins og omanfyri Heygaveg.

Nevndarsamtyktir:
UBN 29-06-2015: Tikið verður undir við tilmælinum frá Teknisku Umsiting, dagf. 06-05-2015.

TrN B&U 01-07-2015: Nevndin tekur undir við UBN 29-06-2015.

Býráðsins samtykt 09-07-2015:
Einmælt samtykt at taka undir við UBN 29-06-2015 og TrN B&U 01-07-2015.

FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI